Vegleiðing til munnligu próvtøkuna eftir B-próvtøkuháttinum í

# enskum

9. flokki

MENTAMÁLARÁÐIÐ

November 2012

# Vegleiðing til B-próvtøkuhátt í enskum í 9. flokki

### Munnliga próvtøkan

Munnliga próvtøkan er í tveimum pørtum:

1. Framløga av sjálvvaldum evni
2. Ókendur próvtøkuspurningur úr kendum tilfari

## 1. Sjálvvalt evni

Til fyrra partin av munnligu próvtøkuni ger næmingurin eina ætlan, ið er støði undir framløguni.

<u>Framløguætlanin skal innihalda:</u>

- Navn/nøvn, flokkur og skúli
- Heitið á yvirskipaða evninum/undirvísingargongdini, ið sjálvvalda evnið hevur samband við
- Heitið á sjálvvalda evninum
- Høvuðspunkt í framløguni og stutt grundgeving fyri, hví evnið er valt
- Keldulisti (viðurkendur leistur skal nýtast)

Framløguætlanin er skrivlig og skal vera á enskum. Hon er eitt yvirlit yvir sjónarmið, sum próvtakarin fer at viðgera í sínari framløgu. Framløguætlanin er ikki partur av endaligu próvdømingini.

Framløguætlanin skal í mesta lagi fevna um eina A4 síðu.

Næmingurin skal lata læraranum góðkendu framløguætlanina í talgildum líki í seinasta lagi 14 dagar áðrenn seinasta undirvísingardag.

Framløguætlanirnar verða senda próvdómara í seinasta lagi 5 dagar, áðrenn próvtøkan fer fram.

Próvtakarin hevur framløguætlanina við sær til próvtøkuna, men tað er ikki loyvt at lesa upp úr henni. Bert framløguætlan, ið lærarin hevur góðkent, er loyvd próvtakaranum at hava við sær inn í próvtøkuhølið. Próvtakarin fær uml. 5 minuttir at leggja fram. Eftir framløguna kunnu próvhoyrari og próvdómari seta dýpandi spurningar.

| *Dømi um framløguætlan* |
| --- |
| **Skúli: Tórshavnar Kommunuskúli** |
| **Lærugrein: Enskt (ENS-90)** |
| **Navn: Bára Bogadóttir** |
| **Flokkur: 9.á** |
| **Yvirskipað evni: Young People Today** |
| **Sjálvvalgt evni: Obesity** |

**2.Yvirskipað evni:Young People Today**

**3.** Heitið á sjálvvalda evninum: *My Topic:* **Obesity**

**4.** Høvuðspunkt í framløguni og stutt grundgeving fyri, hví evnið er valt.

**Why did I choose this topic?**

*My family background*

*Films I've seen*

*A personal interest*

**A. Different kinds of eating disorders**

*Obesity due to binge-eating*

*Anorexia*

*Bulimia*

**B. Who becomes obsessive**

*A case history*

**C. Whose problem is it – and what should be done about the problem?**

*A personal problem*

*Society is to blame – or?*

*School Dinners*

*Tv-programs*

**5. Keldulisti:**

**Sources:**


Morgan Spurlock's film "Super Size Me", Jamie Oliver's Diary:

http://ww.jamieoliver.com/diary/

British School Dinners:

http://www.channel4.com/life/microsites/J/jamies_school_dinners/fom/index.html.

"Ana's girls", Eda R. Uca, personal stories.

http://www.who.int/topics/obesity/en/

http://www.youtube.com/watch?v=CcN-ijsoAw0

**Arbeiðsgongd, tá ið B-próvtøkuhátturin verður nýttur:**

Sjálvvalda evnið tekur støði í skjalfestu undirvísingargongdunum í 9. flokki. Í februar/mars mánaði hava lærari og næmingar hugarok um møgulig evni, sum eru knýtt at teimum ymisku temu, ið flokkurin hevur arbeitt við ella fer at arbeiða við í skúlaárinum.

Undirvísingargongdirnar endurspegla, at arbeitt hevur verið við ymiskum tekstasløgum gjøgnum árið – bæði í skrivligum og munnligum høpi. Talan kann vera um yrkisbókmentir, yrkingar, sangir, stuttsøgur, mynda- og ljóðtilfar o.s.fr.

Próvtakarin skal duga at nýta viðkomandi tekstir í viðgerð síni av sjálvvalda evninum – bæði kendar og ókendar.

**At velja og fyrireika sjálvvalda evnið**

Síðst í mars mánaða f ara næmingarnir undir at arbeiða við sjálvvalda evninum:

- lærari og næmingar velja í felag eitt yvirskipað evni
- hvør næmingur velur sítt evni innan yvirskipaða evnið, sum hann hevur hug at arbeiða við
- næmingarnir kunnu arbeiða einsamallir ella í bólki við 2-3 næmingum
- hvør næmingur ger sína egnu framløguætlan
- næmingarnir gera av, hvørjar keldur teir brúka
- næmingarnir seta 3 – 4 hugdýpingarspurningar til valda evnið
- næmingarnir skriva stuttar, beinraknar viðmerkingar til ymisku spurningarnar í framløguætlanini
- næmingarnir kanna og leita eftir tilfari, ið kann geva teimum íblástur, t.d. heimasíður, bøkur, filmar, fløgur og bløð.

Lærarin er vegleiðari í tilgongdini og skal hjálpa næmingunum at velja tilfar og at avmarka seg í mun til fyrireiking og próvtøku.

Letur næmingur ikki framløguætlanina inn, fer hann til próvtøku uttan hesa at styðja seg til.

Næmingarnir nýta 10-12 tímar í skúlanum at gera framløguætlanina. Arbeiðið fer fram í enskttímunum.

Tekstirnir til sjálvvalda evnið kunnu vera úr keldum, ið arbeitt hevur verið við í 9. flokki, men næmingurin skal eisini velja aðrar viðkomandi tekstir í hóskandi vavi.

Lærarin skal góðkenna endaligu framløguætlanina, áðrenn hon verður latin inn.

Framløguætlanin skal latast læraranum til góðkenningar í seinasta lagi 14 dagar undan seinasta undirvísingardegi.

Næmingurin kann velja at arbeiða víðari við framløguætlanini, men tað er bert góðkenda framløguætlanin, sum er loyvd at hava við til próvtøkuna.

Framløguætlanin telur ikki við í próvdømingini.

## **Nøkur dømi / hugskot til dýping,** ið spretta úr ársins tekstum/temu:

| **Yvirskipað evni/tema** | **Hugskot til dýping** |
|---|---|
| **Teenage Life** | *Love*<br>*Fashion*<br>*Alcohol Abuse*<br>*Drug Abuse*<br>*Generation Gaps*<br>*Getting a Job* |
| **California** | *The Gold Rush*<br>*Famous Songs*<br>*Hollywood*<br>*US Governmental System*<br>*Jeans* |
| **Racism** | *The American Constitution*<br>*The Ku Klux Klan*<br>*Neo Nazism*<br>*Segregation in the Sixties*<br>*Martin Luther King* |
| **Fit and fat** | *Fitness*<br>*Eating Disorder*<br>*Fast Food*<br>*What is Healthy Living?* |
| **Human Rights** | *Children's Rights*<br>*Teenagers and Parents*<br>*Teenagers and School*<br>*Freedom*<br>*Democracy*<br>*Being Different* |
| **Relationships** | *People and Animals*<br>*Jealousy*<br>*Homosexuality*<br>*Life on the Streets*<br>*Young Love* |

## 2. Ókendur próvtøkuspurningur í kendum tilfari

Seinni partur av próvtøkuni fevnir um tveir tættir:

a. upplestur av 4-5 reglum úr teksti, ið er partur av skjalfestari undirvísingargongd í skúlaárinum, og sum er støði undir próvtøkuspurninginum

b. samtala millum próvtakara og próvhoyrara við støði í próvtøkuspurningi, ið er knýtt at teksti/tekstum úr skjalfestari undirvísingargongd

Eftir upplesturin fer ein samtala fram. Samtalan hevur støði í ókendum próvtøkuspurningi, sum próvtakarin tekur. Próvtøkuspurningurin skal vera kveikjandi, og hann skal hava týðiligt samband við tekstir í skjalfestari undirvísingargongd.

Próvhoyringin fer fram innan fyri teir karmar, ið próvtøkuspurningurin setur. Próvtakari og próvhoyrari kunnu taka onnur viðkomandi evni upp í samtaluna og gera samanberingar og metingar.

**Próvtøkuspurningurin skal:**

- vera innanannað yvirskipað evni enn tað, próvtakarin valdi til sjálvvalda evnið
- vera orðaður einfalt greitt
- hava samband við eitthvørt høvuðsevni frá undirvísingini í skúlaárinum
- hava 2-3 tilvísingar til lisnar tekstir, ið próvtakarinskal nýta sum bakstøði, tá ið hann skal meta um og samanbera
- vera á hóskandi torleikastøði, men eisini rúma avbjóðingar til dugnaligu næmingarnar

Próvtøkuspurningarnir skulu endurspegla mentanar- og samfelagsviðurskifti í enskmæltum londum. T.e. at teir skulu fevna um somu temu, sum undirvísingin hevur fevnt um. Eitt land (t.d. Australia) kann í sær sjálvum ikki vera eitt tema, tí tað er alt ov breitt og víðfevnandi. Í staðin ber til at arbeiða við ymsum yvirskipaðum evnum úr landinum, t.d. *Schools in Australia. The Aborigines* ella *Immigration.*

Próvtøkuspurningurin skal vera próvtakaranum ókendur. Próvtøkuspurningarnir skulu vera fjølbroyttir og fevna um øll temu og allar undirvísingargongdir í 9. flokki, ið eru skjalfestar.

**Dømi um próvtøkuspurning:**

| Topic | Text | Question |
|---|---|---|
| California | Canyon of Gold<br><br>Hollywood<br><br>California Schools Hires Photographer to Catch Mexican Students | *What is 'The American Dream'*<br><br>*And do you think*<br><br>*'The American Dream' is still important?* |
| Law and Order | 'Freedom Writers' (filmur)<br><br>A Smack and a Cuddle<br><br>Life Behind Bars<br><br>Dead Man Walking | *What makes the life of a teenager in the text different from yours?* |
| Relationship | 'Romeo and Juliet' (filmur)<br><br>Juno<br><br>Wolves<br><br>Sea Change<br><br>She's Leaving Home | *Many adults think teenagers are selfish. What is your opinion?* |

**Dømingargrundarlag**

Próvtøkan er ein framløga av sjálvvaldum evni og ein ókendur próvtøkuspurningur, sum tekur støði í kendum tilfari.

*Sjálvvalda evnið*

Próvtakarin skal við støði í fakligari tilgongd og støðisførleikum sýna evni at orða seg sjálvstøðugt um innihaldið í sjálvvalda evninum. Próvtakarin skal sýna, at hann dugir at taka fram týðandi tættir í tilfarinum, seta teir í samband við tættir í undirvísingini og seta próvtøkutilfarið í frásjón.

*Ókendi teksturin*

Próvtakarin skal evna at lesa 4-5 reglur í tekstinum hart, so at innihaldið í tekstinum kemur klárt til sjóndar. Próvtakarin skal á greiðum enskum máli viðgera týðandi tættir í tekstinum og duga at seta tekstin í frásjón, eisini í mun til aðrar tekstir, sum hava verið partur av undirvísingini.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.